# Samskip

## Samskip søkir hálvtíðar skrivstovufólk til innflutningsdeildina

**Starvslýsing:**
Sum skrivstovufólk á innflutningsdeildini hevur tú regluligt samskifti við viðskiftafólk í Føroyum og uttanlands.

Tú tekur tær av øllum vanligum skrivstovuarbeiði, sum í høvuðsheitum fevnir um fakturering, tollavgreiðslu, innan- og uttanhýsis sølu, eftirlitsuppgávur og arkivering.

**Førleikakrøv:**
Fyrimunur er, um tú hevur viðkomandi útbúgving og arbeiðsroyndir.
Vit leggja dent á ágrýtni, dugnaskap, nærlagni, miðvísi og tænastusinni, og at starvsfólk okkara ikki lata seg taka av fótum, um stundum trýst er á.
Vit vænta, at tú dugir væl at samskifta á føroyskum og enskum.

**Vit bjóða:**
- Eitt áhugavert, spennandi og fjølbroytt starv í heimligum og altjóða umhvørvi.
- Góðar møguleikar fyri persónligari menning.

**Setanartreytir:**
Starvið er hálvtíðarstarv og verður lønt sambært avtalu, sum er treytað av útbúgving og royndum.
Viðkomandi kemur at starvast á skrivstovu okkara í Tórshavn.

**Umsókn:**
Send umsókn við CV og øðrum viðkomandi skjølum til:

Samskip P/F
Yviri við Strond 23
Postsmoga 3255
110 Tórshavn

Merkt: "Umsókn"

Umsóknarfreistin er 17. august 2009 kl. 12.00.

**Starvið**
verður sett 1. september 2009.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Joel undir Leitinum, stjóra, á telefon 23 88 11

### Fyrirtøkan

**Samskip er ein altjóða flutningsfyritøka. Fyritøkan er ein tann største bingjuflutningsfyritøkan í Europa og bjóðar millum annað flutning av vøru til og úr Føroyum. Í Samskip samtakinum arbeiða uml. 1.400 fólk í fleiri enn 20 londum. Samskip byrjaði í Føroyum í 2004 og er í dag ein av leiðandi feløgunum innan flutning til og úr Føroyum. Virksemið hjá Samskip verður samskipað í Kollafirði og Tórshavn. Frystigoymslan hjá Samskip í Kollafirði rúmar 7.000 tonsum. Skipini Helgafell og Arnarfell eru skrásett í FAS skipanini.. Tvey skip, á 900 TEUs hvørt, og eitt skip, 1.100 TEUs eru í fastari linjusigling til og úr Føroyum.**

# TAKS

## Vit sóknast eftir fleiri kundarøktarum

**Hevur tú tænastulyndi** og er hugað/ur at møta viðskiftafólkinum, har tey eru stødd, so ert tú kanska næsti kundarøktarin hjá TAKS.

**Sum kundarøktari** gerst tú partur av einum livandi, fjølbroyttum og sjálvstøðugum arbeiðsplássi. Á stovninum er eingin dagur eins, og tí kann tín smidligleiki viðvirka til at gera allan munin.

**Høvuðsuppgávurnar** hjá kundarøktarunum eru at røkja kundatænastuna og at seta í journal.

**Vit ímynda okkum**, at tú hevur HH ella aðra miðnámsútbúgving, skrivstovuútbúgving og/ella aðra líknandi útbúgving.

**Vit vanta**, at tú er til reiðar at menna teg saman við stovninum og er sinnað/ur at ogna tær nýgga vitan. At tú tekur við ábyrgd á tínum arbeiðsøki, hevur góð samstarvsevnir, skapar úrslit og ger títt til at skapa arbeiðsgleði, tað taka vit sum ein sjálvsagdan lut.

**Setanarøkið** fevnir um Fíggjarmálaráðið og stovnar undir tí, og starvið verður lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarandi yrkisfelag. Kundatænastan húsast á Argjum.

**Meira fæst at vita** um starvið við at venda sær til Ásu Olsen, leiðara á kundatænastuni á telefon 352600.

**Umsókn**, CV og avrit av prógvum, og viðmælum skal sendast til taks@taks.fo ella **TAKS, Postsmoga 2151, FO-165 Argir.**

Umsóknin skal stílast til Ásu Olsen, leiðara í kundatænastuni og viðmerkjast: Umsókn, kundarøktari. Freistin at søkja starvið er 20. august kl. 15.00

*Vit trygga landskassanum skatta- og avgjaldsinntøkur. Eyðkenni okkara skal vera góð tænasta.*
*Misjónin hjá TAKS*

TAKS er stovnur undir Fíggjarmálaráðnum, hvørs uppgáva er at fyrisita toll- og avgjalsskattalógina og innheintingar innan málsøkini hjá stovninum. TAKS hevur 135 starvsfólk og er skipað við einari høvuðseind á Argjum og trimum skrivstovueindum runt landið.

# SAVNVØRÐUR

**Savnvørður**
Søkt verður eftir avloysara fyri savnvørð á fólkalívsdeildini á Føroya Fornminnissavni við setan skjótast gjørligt. Starvið er tíðaravmarkað til 30. september 2011.

**Starvsøki**
Fólkalívsdeildin tekur sær av fólkalívsfrøðiliga rannsóknar- og granskingarvirksemi stovnsins og varðar av søvnum, ið viðvíkja yngri tíð, miðlingini av virkseminum, herundir framsýningargerð. Starvið umfatar eisini røkt og menning av talgildum skráum og veitan av fakligari ráðgeving til bygdasøvn.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarar skulu hava kandidatútbúgving í fólkalívsfrøði ella søgu.

Harumframt vænta vit, at tú:
- hevur góðan førleika at arbeiða sjálvstøðugt
- ert røkin og hevur evni og vilja at samstarva
- ert opin fyri førleikamenning
- hevur royndir í savnsarbeiði og miðling
- dugir at orða teg munnliga og skrivliga á føroyskum, norðurlendskum og enskum
- hevur góðan kunnleika til vanlig telduforrit.

**Lønar- og setanarviðurskifti**
Løn og setanartreytir eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

**Vit bjóða**
Eitt sera spennandi og avbjóðandi starv við skiftandi uppgávum og nógvum samskifti inn- og úteftir.

**Umsókn**
Umsókn við avritum av prógvum, ævisøgu (CV) og øðrum skjølum, upplýsingum um royndir og førleika v.m. skal sendast til:

Føroya Fornminnissavn
Kúrdalsvegur 16
Postrúm 1155
110 Tórshavn

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin 24. august 2009.
Umsøkjarar kunnu seta seg í samband við Andras Mortensen, stjóra, á telefon 310700, andrasm@fornminni.fo, fyri at fáa meira at vita um starvið.

Føroya Fornminnissavn er stovnur undir Mentamálaráðnum. Fornminnissavnið er skipað í fyrisiting landsantikvarsins, fornfrøðideild, fólkalívsdeild og bygningadeild. Fyrisiting og deildir eru á Kúrdalsvegi 16 í Hoyvík, meðan framsýningarhølini eru i Brekkutúni 6 í Hoyvík. Sí annars heimasíðu savnsins, www.fornminni.fo.

FØROYA FORNMINNISSAVN

STEPHANSSONS HÚS



W W W . S O S I A L U R I N . F O